átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið



*Hesa vikuna:*

**John S. Myllhamar**

## Flyt ikki gomul mørk

**"Flyt ikki avgomul markaskjal, sum fedrar tínir hava sett"** Orðtøkini 22, 28

Tað liggur til ungfólk at vilja broyta gamlar siðvenjur. Tey ungu síggja jú við nýggjum og øðrvísi eygum, og sjón teirra sær oftað betrið tað, ið einki gagn er í longur. Vit eiga at fegnast um, at tey yngru hava dirvið og áræði at taka ymiskar spurningar upp til metingar, tí um tað ongantíð hendir, kunnu vit lættliga stívna í formum, og tað í formun, sum ikki hava Guðs orð aftan fyri seg.

Men eins og tað er satt og vist, at okkurt ikki er gott, bara tí tað er gamalt, er tað eisini satt, at tað ikki nýtist at vera ringt, bara tí tað er gamalt. Tað kann jú eisini vera, at orsøkin til at tað helt so leingi var hon, at onkur dygd var í tí. Tí eiga vit ongantíð at tveita nakað burtur, fyrr enn við gjølla hava kannað, hvat tað er. Vit leggja ikki merkið til øll virði bara við at skeita at teimum eitt bil. Til tíðir kunnu virði vera inni í, sum vit ikki síggja uttaná.

Tá ið høvundin av orðtøkunum ræður okkum til, at vit ikki skulu flyta tey markaskjal, sum fedrar okkara hava sett, so býr stórur vísdómur aftanfyri orð hansara. Hann eigur ta eyðmýkt, ið virðir verkið hjá øðrum. Vit eru ikki teir fyrstu, sum møta á arbeiðsplássinum. Onnur vóru her áðrenn vit, og vit eiga at vera takksom fyri, at vit ikki hvørja ferð eitt nýtt ættarlið kemur til, verða noydd at byrja á berum. Tann Guð, ið vil læra okkum øll tað kynstur at liva lívið rætt, hevur havt onnur í skúla áðrenn okkum, og tað er stór hjálp fyri okkum, at vit kunnu byggja víðari á tað, sum Guð lærdi tey. Amen!

# Fyrstu 270 húsini eru longu seld

**Tað hevur gingið væl hjá hjálparfelagsskapinum ADRA at selja hús í Kenya. Fleiri føroyingar hava eisini keypt hús til heimleys flóttafólk í hesum afrikanska landinum**



**Neyðhjálp:** Í mars mánaði í ár skipaði ADRA fyri einum serstøkum tiltaki í Føroyum, har m.a. tvær gospelkonsertir við donsk songkvinnuni Etta Cameron vóru á skránni.

Við hetta høvið var møguligt hjá fólki at keypa hús til flóttafólkini. Og beinanvegin vóru tað um 50 føroyingar sum keyptu hús í Kenya.

Hetta sama tiltakið er haraftrat sett í verk í Danmark, og í dag kann staðfestast at meiri enn helmingurin av teimum í alt 500 húsunum eru keypt.

Hvørt húsið kostar 3200 krónur, men møguleiki er eisini at keypa ein part í einum húsi.

- Tey fyrstu 900 húsini og ein skúli eru longu bygd við stuðli frá Danida, og tey næstu 350 húsini standa í løtuni í gerð.

- Men talið av flóttafólkum og heimleysum er framvegis sera stórt. Tí vilja vit fegin hjálpa enn fleiri familjum at fáa sítt egna heim, verður sagt úr ADRA.

Hesin felagsskapurin arbeiðir út frá teimum bíbilsku høvuðstreytunum um at elska næstan sum sjálvan seg. Íalt arbeiða 4000 starvsfólk hjá felagsskapinum kring allan heimin, og arbeiðir beinleiðis í 120 londum.

Tað er kortini ikki bert maðurin á gøtuni, sum hevur veitt donsku deildini av hesum altjóða hjálparfelagsskapinum stuðul. Landsstýrið hevur eisini avgjørt at stuðla verkætlanini í Kongo.

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard hevur á fundi við ADRA upplýst, at føroyingar sjálvir ynskja at veita menningarstuðul og neyðhjálp, har tað er neyðugt.

Sjálvur vildi hann ikki yvirfyri ADRA-umboðunum seta tøl á hansara ambisjónir fyri føroysku menningarhjálpina.

- Men eg vil kortini siga, at vit fegin vilja hagar, har heimurin kring okkum, fer at leggja merki til Føroyar og okkara arbeiði, segði hann.

Í samrøðuni við ADRA-umboðini metti løgmaður felagsskapin sum virknan, við veruleikakendum og gjøgnumskygdum verkætlanum.

- Tað er ikki trupult at fáa eyga á týdningin av at geva heimleysum flóttarfólkum tak yvir høvdið og eina nýggja byrjan í lívinum.

- Her vilja vit fegin verða við, segði Jóannes Eidesgaard.

# Møta nútíðini við tí gamla boðskapinum

**"Hvussu møta vit nútíðarmenniskjum við gleðiboðskapinum?", er evnið sum verður tikið fram leygardagin í næstu viku**

**Toftir:** Leygardagin 9. juni skipar Heimamissiónin fyri boðanarskeiði í Missiónshúsinum "Tabor" á Toftum við dananum Leif Andersen.

Leif Andersen er gudfrøðingur og starvast sum lærari á Menighedsfakultetet í Århus og sum ferðaprestur hjá donsku Indre Mission. Í nærum 30 ár hevur hann arbeitt í spenninginum millum tann bíbilska boðskapin og nútíðarmenniskju. Hann hevur nýliga skrivað tvær bøkur um evnið við heitinum "Teksten og tiden", sum hava fingið góð ummæli frá ógvuliga ymiskum sjónarhornum.

Á skeiðnum við undirheitinum "Gleðiboðskapurin - útgáva 2007" verður millum annað umrøtt, hvussu ein kann boða ein óbroyttan gleðiboðskap í einum broyttum samfelagi, og hvat eyðkennir okkara tíð og hvat eyðkennir okkum sjálvi.

Ein annar týdningarmikil spurningur á skeiðnum er tann, um til eru partar av tí kristna boðskapinum, sum ein í dag skal leggja ein annan dent á?

- Skeiðið er viðkomandi fyri øll, sum onkursvegna hava við boðan at gera, sigur Heimamissiónin.

## Palau talaði fyri 90.000 fólkum

**USA:** Suðuramerikanski evangelisturin Luis Palau, ið eisini hevur vitjað í Føroyum, tosaði næstseinasta vikuskiftið fyri 90.000 fólkum í amerikanska býnum Nashville. Hetta var í samband við festivalin "The Luis Palau Nashville Cityfest", har bæði tónleikur, ekstremítróttur og møtir vórðu hildin.

Aftaná kundi Palau fegnast um tiltakið, sum allur býurin hevði verið saman um.

- Samstarvið millum myndugleikarnar, felagsskapin millum allar tær ymisku kirkjurnar, stuðulin frá vinnulívinum og lyklapersónum, saman við tí veruleika at so mong komu saman um Guds kærleika, er ein stór heiðurskvøða til henda býin, segði Palau.

## Kórsangur og mentan hond í hond

**Havn:** Fyrsta fríggjakvøld í juni mánaði er árliga Mentanarnáttin í Tórshavnar kommunu. Í kvøld fara nógv ymisk tiltøk av bakkastokki, m.a. eitt við nógvum kórsangi í Ebenezer.

Tiltakið byrjar kl. 22 tá Siloa-kórið úr Fuglafirði fer at syngja. Síðani syngja Betesda-kórið og at enda Ebenezer-kórið.

Kvøldið endar við at øll trý kórini syngja saman.

## Tómu kirkjurnar skulu brúkast

**Noreg:** Fleiri kirkjur í Oslo hava ov nógv tóm sitipláss undir gudstænastunum. Men nú ætlar kirkjuverjin, Valgerd Svarstad Haugland at brúka kirkjurnar til onnur endamál.

Í miðbýnum í norska høvuðsstaðnum eru íalt 1943 sitipláss í 14 meinigheitum, men ein vanligan sunnudag eru bert 300 teirra upptikin.

- Eg trúgvi at mong høvdu fingið eina betri uppliving av gudstænastuni, um kirkjurnar vóru fullar av fólki, sigur Valgerd við norsku Dagsavisen. Arbeitt verður í løtuni við at greina út nýtsluna av Oslo-kirkjunum.

Verkætlanin varir fram til 2010, og úrslitið kann føra við sær, at sóknir verða broyttar og til at uppgávur og virksemið verður skipaðar á annan hátt.

Ætlanin er í øllum førum, at tær tómu kirkjurnar ikki skulu verða verandi tómar.